# Føroyingar kunnu seta met í Litava

**Higartil hava føroyingar ongantíð megnað at spælt fýra landsdystir á rað uttan at tapa, og nú er 60 talið av álvara í eygsjón hjá Óla Johannesen**

LANDSLIÐIÐ OG METINI
*Jóannes Hansen*

Um tað leygardagin 12. oktober fer at eydnast fótbóltslandsliðnum at sleppa av vøllinum í Litava uttan at hava tapt, so verður talan um met, sum má mestast at verða framúr. Møguliga metið verður, at føroyingar so hava megnað at spælt fýra landsdystir á rað uttan at tapa.

2–2 ímóti Skotlandi var triðja ferðin á rað, uttan at Føroyar hava tapt. Landsliðið hevur higartil í ár spælt fýra dystir. 10. februar taptu teir 2–1 ímóti Póllandi, og 13. februar vunnu teir 1–0 ímóti Liktinstein. Ta ferðina skoraði Uni Arge málið, sum seinni vísti seg at verða tað seinasta hjá honum á landsliðnum. Hesir báðir dystirnir vórðu spældir á venjingarleguni á Kypros.

21. august vunnu Føroyar 3–1 á Tórsvølli ímóti Liktinstein. Føroyar hava eina ferð áður vunnið tveir landsdystir upp í slag. Tað vóru teir báðir 2–1 sigrarnir á Malta í HM undankappingardystunum í 1997.

Føroyar hava eina ferð áður spælt tríggjar dystir á rað uttan at tapa. Teir vóru í 1999. Tá endaði vinardysturin ímóti Andorra í sambandi við venjingarleguna í Spania málleysur, og so spældu Føroyar tvær ferðir javnt í EM undankappingardystum á Svangaskarði – 1–1 ímóti Skotlandi og 2–2 ímóti Bosnia.

At tað ongantíð er skilagott at kanna sær bitan, áðrenn hann er svølgdur, er gongdin í 1999 gott dømi um. Framúr javnleikirnir ímóti Skotlandi og Bosnia bóru við sær, at tað varð roknað við góðum úrslitum í næstu dystunum, sum vóru á heimavølli, men tað kiksaði fullkomuliga.

Ísland vann 1–0 á Tórsvølli, og so løgdu Føroyar rygg til EM tap ímóti Estlandi og Litava, sum vunnu ávikaavíst 2–0 og 1–0.

Hetta vóru vánaligu royndirnar, tá tað snýr seg um at stríðast fyri fjórða góða úrslitinum á rað.

Tað ber eisini til at finna tøl, sum kunnu brúkast sum grundarlag fyri vónini, at tað hesa ferð skal eydnast at spæla fýra ferðir á rað uttan at tapa. Føroyar og Litava vóru í EM undankappingarbólki saman í 1998 og 1999. Í oktober í 1998 vóru Føroyar á landsliðsferð í Litava og Skotlandi. Ferðin hilnaðist sera væl. Í Litava var úrslitið 0–0, og í Skotlandi taptu Føroyar 2–1. Um úrslitini um ein mánað í Litava og Týskalandi høvdu verið ein endurtøka av teimum á uttanlandsferðini fyri fýra árum síðani, so hevði tað borið væl til at liva við tí.Men kanska tey verða uppaftur betur!

## Óli á veg ímóti seksti

Hvørja ferð, hann fer á vøllin, setur 30 ára gamli Óli Johannesen nýtt dystarmet. Leygardagin umboðaði hann Føroyar fyri 57. ferð, og nú er 60 talið av álvara í eygsjón. Um Óli hevði havt verið við á venjingarleguni á Kypros í vár, so hevði dystur nummar 60 verið á skránni í Litava 12. oktober. Men ta ferðina fyrireikaði Óli seg saman við Hvidovre til seinnapartin av donsku landskappingini.

Um landsliðið fer at spæla skrásettan landsdyst á venjingarleguni, sum er ætlað at vera í februar komandi ár, so verður tað dystur nummar seksti hjá Óla Johannesen, um hann verður við í báðum dystunum á uttanlandsferðini í oktober. Og tað verður hann, um ikki skaðar fara at halda honum aftur, og um hann ikki verður útvístur í Litava og harvið leikbannaður í Týskalandi.

Eingin ivi man vera um, at nú fer Óli Johannesen ikki at geva avboð til landsliðið. TB fær gagn av, at liðformaðurin á landsliðnum fær dystarvenjing í altjóða uppgávum. Tá Óli var í Hvidovre, var neyðugt hjá honum at venja og spæla saman við liðfeløg unum, um hann skuldi spæla á 1. liði og harvið vera so væl fyri at spæla á landsliðnum, sum tað bar til.

Men tað er neyðugt hjá Óla Johannesen at dríva á, um hann framvegis skal varðveita metið. Jens Martin Knudsen er treiskur og vil ikki geva seg. Seinastu fýra árini hevur hann sitið á beinkinum í øllum týdningarmiklum dystum. Nú fekk hann møguleikan aftur, og í samlaða roknskapinum er hann bara ein dyst aftanfyri Óla Johannesen.



*Føroyska landsliðið hevur sjáldan staðið seg væl, sum tað ger í løtuni, og fæst stig úr komandi útidystinum móti Litava, er talan um met*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hvør hevði ábyrgdina

**Barry Fergusson tykist vera einasti maðurin í skotska landsliðshópinum, sum ásannar, at við hetta lag kann venjarin ikki sita leingi í sessinum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*



*Skotski venjarabonkurin er fyri hørðum atfinningum í fjølmiðlunum, men enn tykist Vogts at sita tryggur í sessinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað verður sjálvandi gjørt burturúr landsdystinum millum Føroyar og Skotland í skotsku miðlunum, og reyði tráðurin er sum vera man, at hetta úrslitið so avgjørt ikki var nakað at reypa av.

Og sjálvsagt hevur pressan eisini roynt at finna sínar syndabukkar, men tað tykist tó vera ein óskrivað avtala millum leikarar og venjara, at hetta er nakað, sum teir allir taka á seg.

Bæði undan dystinum og á tíðindafundinum eftir dystinum heitti Berti Vogts á skotsku miðlarnar, at teir ikki skuldu leggja eftir leikarunum.

- Gongur tað væl, so eiga leikararnir æruna. Gongst minni væl, so vælsignaðir lati vera við at leggja eftir teimum. Teir eru ungir og óroyndir, og tí nyttar tað einki at leggja trýst á teir, so leggi heldur eftir mær, vóru boðini frá Vogts undan dystinum, og hetta var eisini nakað, sum varð endurtikið eftir dystin.

Hinvegin tykjast leikararnir ikki hava nakað ímóti, at skuldin fyri javnleikin verður løgd á teir. Sostatt hevur liðskiparin hjá Skotlandi, Paul Lambert, sagt við skotsku miðlarnar, at teir ikki skulu geva Vogts ábyrgdina fyri tapið.

- Tað var ikki Vogts, sum spældi dystin. Vit spældu dystin, og okkara avrik var undir alt lágmark, so tað eru vit, sum skulu hava skoluna, vóru orðini hjá liðskiparanum.

## Ferguson er ikki samdur

Einasti maðurin, sum tykist hava ásannað, at sessurin hjá Vogts er í álvarsligum vanda, er liðskiparin hjá Glasgow Rangers, Barry Ferguson, sum eisini var maðurin, sum tryggjaði skotum javnleikin.

- Tað er heilt greitt, at hatta ikki var nóg gott, og verður talan um fleiri úrslit av hasum slagnum, so er lítið at ivast í, at okkurt má henda, segði Fergoson.

Glasgow maðurin var annars eftir dystin móti dønum fyri atfinningum frá venjaranum, so møguliga hevði hann einki havt ímóti, nýggjur venjari varð settur fyri Vogts, men tann spurningurin sleppur so í øllum førum at hanga í leysum lofti ein mánað ella so afturat.



# Øll tjóðin er í øðini

**Skotar fingu av at vita á heimferðini, har mest sum hvørt tað einasta blað kravdi venjaran frá í stundini**

ÚTLENDSKIR MIÐLAR
*Jákup Mørk*




*Skotar vóru alt annað enn fegnir um avrikið móti Føroyum, og í sunnudagin fingu bæði leikarar og venjarar av at vita, men áskoðararnir mundu tó hava ein góðan túr hóast alt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Skotska landsliðið fekk eina sera kaldliga móttøku av Føroyaferðini, um metast skal eftir sunnudaginsbløðunum har á leiðini.

»Hepnir skotar fingu javnleik« og »Fullkomin eyðmyking« taldust millum yvirskriftirnar í skotsku bløðunum, og serstakliga er tað týski venjarin hjá skotum, Berti Vogts, sum stendur fyri skotunum frá skotunum.

Sunday Mail hevði nýtt alla baksíðuna til at siga venjaranum, at »Tín tíð er farin Berti, vit kunnu ikki halda fram soleiðis«, og sum tað stendur aðrastaðni á hesum síðum, so gevur Barry Ferguson eisini blaðnum rætt í hesum.

Scotland on Sunday vóru kanska enn meira lemjandi í sínum dómi, tá teir slerdu fast, at sjálvt ein gøluraktur politikkari hevði havt betri møguleikar enn Vogts at siti í sessi sínum, og Scotland on Sunday steðgaðu ikki á við hesum: »Vogts fór við Føroyum« og »Eg spæli á skotska landsliðnum.... hjálp mær burtur« taldust millum yvirskriftirnar, tá metast skuldi um avrikið á Svangaskarði.

Og millum tær meira speisku yvirskriftirnar taldust eisini nakrar, sum ikki uttan víðari kunnu umsetast til føroyskt: »Faroe 2 Zeros 2« skrivaði Scottish News of the World, sum eisini hevði prýtt baksíðuna við tí sera einfalda »Clueless«, og á næst afturstu síðu stóð »Beri's dudes are truly a laughing stock».

Tað vóru tó ikki øll, sum dugdu at síggja tað stuttliga í hesum. Í øllum førum ikki hjá Sunday Herald, sum eftir dystin søgdu »Utter Humiliation, Who do you think you are kidding, Mr. Vogts!«

Sum skrivað aðra staðni, so sigur skotska fótbóltssambandið seg framvegis hava fult álit á Vogts, men sum onkur klummuskrivari tók til, so er ein venjarasessking ofta í kjalarvørrinum í slíkum úttalilsum.

Hvussu er og ikki, so er tað framvegis langt ífrá víst, at Vogts verður sekkjaður. Fleiri atkvøðugreiðslur eru at finna á ymsum heimasíðum, og tó at tær flestu vísa, at fólkið vil hava Vogts frákoyrdan, so er meirilutin ikki so stórur, sum vandi annars kundi verið fyri.

# Popczynki og GÍ gera samgongu

**Umframt at venja besta liðið skal Krzystof hava ábyrgdina av øllum venjingunum í yngru deildunum og spæla í álopinum í 1. deild**

GÍ VENJARIN
*Jóannes Hansen*




*Tað var kanska væntandi, og nú er tað í øllum førum veruleiki, at Krzystof Popczynski skal venja besta mansliðið hjá GÍ komandi kappingarár*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð skal GÍ royna seg við venjara, sum umframt at halda skil á venjingini, seta liðið og leggja taktikkin eisini skal spæla við sjálvur. Johan Nielsen og allir hinir GÍ venjararnir hava hildið seg á beinkinum, men nú hevur GÍ gjørt av royna sama leistin, sum fleiri av hinum feløgunum í 1. deild hava roynt.

Á GÍ heimasíðuni stóð fyrrapartin í gjár, at nevndin í GÍ hevur gjørt avtalu við Krzystof Popczynski um, at hann skal vera høvuðsvenjari hjá GÍ tvey tey næstu árini. Hann fer at loysa Johan Nielsen av. Fyri einari viku síðani boðaði GÍ frá, at teir og Johan Nielsen hvørt í sínum lagi fóru at leita nýggjar leiðir.

GÍ sigur, at nýggi venjarin umframt at hava ábyrgdina av besta liðnum fer at hava høvuðsábyrgdina av venjingini í yngru deildunum. Í ár hevur Popczynski verið venjari hjá tveimum yngri liðum, og teir hava latið serliga væl at í Gøtu.

GÍ sigur eisini á heimasíðuni, at Popczynski framvegis er ein av bestu álopsspælarunum í 1. deild, og at hann fer at hjálpa til inni á vøllinum. Burtursæð frá, at Ole Skouboe spældi onkra ferðina við, tá hann var GÍ venjari síðst í áttati árunum, so hevur eingin GÍ venjari nakrantíð spælt á besta liðnum.

Popczynski, sum er 33 ára gamal, hevur verið í Gøtu hetta kappingarárið. Hann kom til Gøtu, tí hann skuldi spæla á besta liðnum, men tað hevur ikki gingið so, sum pólverjin og GÍ høvdu ætlað. Skaðar hava støðugt plágað, og tað er ikki fyrrenn eftir summarsteðgin, at Popczynski hevur verið førur fyri rættuliga at spæla.

Krzystof Popczynski kom fyrstu ferð til Føroya í 2000. Hann hevði ábyrgdina, tá VB fyri fyrstu og higartil einastu ferð vann meistaraskapin. Í fjør gekk ikki heilt so væl hjá VB, m. a. tí Popczynski var nógv skaddur.

– Vit hava úr Vági hoyrt nógv gott um Popczynski sum venjara, so tað verður spennandi at fara undir eitt nýtt samstarv. Hann hevur vant yngri lið her hjá okkum, og har er nógv komið burturúr, sigur Magni Jarnskor, veteranurin á GÍ miðvøllinum.

Enn hevur einki verið at hoyrt um, hvørjar spælarar Popczynski fer at venja komandi ár. Henning Jarnskor og Áslakur R. Petersen eru farnir av landinum, og eftir summarsteðgin er Bárður á Lakjuni komin afturat hinum, sum hava verið trúfastir í GÍ.

Tá Gidek í fjør kom úr Póllandi og til Gøtu, hoyrdist, at Popczynski hevði verið millummaður. Tað hevði ikki komið heilt óvart á, um GÍ inntil komandi ár fekk onkran pólverja aft-urat at hjálpa sær. Men hetta hava vit ikki frætt nakað um enn.

# Berti Vogts fær ikki sekkin hesa ferð

**Skotska fótbóltssambandið veitir venjaranum og hjálparvenjaranum fullan stuðul, men skotsku fjølmiðlarnir síggja útsøgnina um stuðul sum tekin um, at venjarin skjótt fer at fáa sekkin**

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*

Berti Vogts var sera einsamallur í Føroyum. Høggini frá skotsku pressuni vóru nógv og tung, og tað var eyðsýnt, at flokkurin av tíðindamonnum tevjaði blóð. Teir hildu lítið um venjaran, og teir høvdu avgjørt einki ímóti, at Berti Vogts skjótt varð fyrrverandi landsliðsvenjari hjá Skotlandi.

Tá skotska ferðalagið aftur hevði fingið fast undir føturnar í Glasgow, boðaði skotska fótbóltssambandið, SFA, frá, at teir hava treytaleyst álit á venjaranum:

– Skotskur liðfótbóltur og landsliðið eru í altjóða aldudali. Um ein mánað er dystur í Íslandi á skránni. Vit rokna við, at úrslitið í tí dystinum verður rættuliga avgerandi fyri, um tað fer at eydnast okkum at vinna næstfremsta plássið í bólkinum og harvið framvegis at hava møguleikan at røkka endaspælinum í Portugal. Síðani verður landsliðssteðgur í seks mánaðir. Tann steðgurin fer at koma væl við, tí tá verður møguleiki fyri hjá venjaranum at arbeiða meiri við at samanspæla liðið.

Soleiðis segði aðalskrivarin í SFA, David Taylor. Hann hevur við starvsfólkasetanir og harvið landsliðsvenjararnar at gera, og hann hevði meiri í posanum:

– At tað er vón fyri framman verður undirstrikað av góðu úrslitunum, sum U–21 landsliðið hevur fingið seinastu tíðina. Vit rokna við, at Berti Vogts fer at gera nýtslu av uppaftur fleiri av hesum framtíðar spælarunum.

U–21 landsliðið fekk fríggjakvøldið 1–1 ímóti Norðurírlandi. Á liðnum hjá Berti Vogts, sum var í Føroyum, vóru fimm spælarar, sum hava aldur at spæla á U–21 landsliðnum.

Venjari hjá U–21 landsliðnum er Rainer Bonhof. Hann og Berti Vogts hava arbeitt nógv saman. Í síni tíð vóru teir liðfelagar hjá Allani Simonsen í Borrussie Mönchengladbach, og teir vóru báðir á liðnum, sum í 1974 á heimavølli vann HM finaluna 2–1 ímóti Hollandi.

Tá Berti Vogts var týskur landsliðsvenjari, var Bonhof hjálparvenjari. Teir fingu báðir starv í Skotlandi í senn, og um tað stendur til SFA, so fara teir at halda fram í størvunum alt sáttmálaskeiðið.

## Sekkurin lúrir

Men skotsku fjølmiðlarnir halda lítið um tað, sum aðalskrivarin í skotska fótbóltssambandinum sunnudagin kendi seg noyddan at boða frá.

Í skotsku miðlunum verður sagt, at tá tú fert at undirstrika, at samstarvið gongur væl, so er tað ábending um, at tað skal lítið til afturat, áðrenn endabrestin. Skotsku fjølmiðlarnir siga seg rokna við, at Vogts fer at fáa sekkin, um Skotland ikki fer at fáa eitt líkinda úrslit í Reykjavík.

Á BBC heimasíðuni sláa teir kalt vatn í blóðið. Eyðmýkingin er ikki fullkomin enn. Eftir javnleikin í Føroyum fer Skotland at tapa í Íslandi. Skotland eigur ikki spælararnar at vera við í europeiska toppinum. Og tað verður ikki frægari, um Berti Vogts fer at fáa sekkin. Trupulleikin er, at tað eru og nógvir útlendingar á bestu liðunum í Skotlandi. Tí sleppa ov fáir skotar framat at fáa royndirnar, sum eru neyðugar, um landsliðið skal standa seg, er sjónarmiðið hjá meiri sinniligu skotsku pressumonnunum.